Keypssamtøkan í Hoyvík

Keypssamtøkan í Hoyvík
sóknast eftir

**Starvsfólki til matstovuna**



**Á matstovuna í Keypssamtøkuni í Hoyvík verður sóknast eftir einum starvsfólki til fyrifallandi arbeiði at byrja skjótast til ber**

Arbeiðið er at ganga til handar í køkinum og matstovuni.

Arbeiðstíðin verður 35 tímar um vikuna.

**Løn:**
Sambært sáttmálan við Havnar Arbeiðskvinnufelag

Nærri fæst at vita við at venda sær til leiðaran, Maud Matras, tel 314149

Skrivlig umsókn skal, skjótast til ber, sendast til

FK Hoyvík
Brekkutúni 9
FO 188 Hoyvík
Postboks 349
att: Maud Matras


# Hoydal og Tikkanen á bóka toppfundi



*Gunnar Hoydal á bókakafé saman við Solveig Røvik, leiðara í Bokbyen í Tvedestrand, og Øyvind Bjorvatn, rithøvundur og fyrrverandi limur í stórtinginum*

*Mynd: Jan Kløvstad*

**Heilt nógv fólk lýddu á, tá Gunnar Hoydal og Märta Tikkanen lósu upp og kjakaðust á bókmentaligum toppfundi í Kristiansand og Tvedestrand í Norra um vikuskiftið**


BÓKATILTAK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*


Aftur í ár skipaði Bókabýurin við Skagerrak í norsku Tvederstrand Kommunu fyri sonevnda bókmentaliga toppfundinum í sambandi við, at vinnarin av Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins verður funnin síðst í hesum mánaðinum.

Heiðursgestir á tiltakinum hesuferð vóru Gunnar Hoydal úr Føroyum og kendi finski rithøvundurin Märta Tikkanen.

## Upplestur

Endamálið við árliga bókatiltakinum í Bókabýnum í februar mánað er at varpa ljós á norðurlendskar bókmentir. Soleiðis fekk Gunnar Hoydal hesuferð høvi at lesa upp úr nýggju skaldsøgu síni *Í havsins hjarta*, sum kom út í fjør.

Sum kunnugt er stóra skaldsøgan hjá Gunnari Hoydal millum annað ein lýsing av menningini í føroyska samfelagnum frá 1880'unum fram til seinasta aldarmót. Rithøvundurin nýtti í hesum sambandi høvið at hugleiða um samspæl og mótspæl millum danska og føroyska mentan.

Kendi finski rithøvundurin Märta Tikkanen valdi at lesa upp úr bók síni *Två – scener ur ett konstnäräktenskab*, ið er ein sjálvævilig lýsing av hennara baldruta hjúnalag við høvundan Henrik Tikkanen. Märta Tikkanen hevur annars eitt heilt serligt samband við norska bókmentaheimin. Tað vóru nevniliga norskar kvinnur, sum tóku stig til at lata henni "Nordiske kvinners litteraturpris" fyri savnið, *Århundrets kälekssaga* frá 1978, ið gjørdi Tikkanen kenda um allan heim, og sum eisini er týtt til føroyskt.

## Bókakjak

Mongu áhoyrarnir, ið vóru møttir til bókamentaliga toppfundin, fingu eisini høvi at hoyra Gunnar Hoydal og Märtu Tikkanen kjakast um norðurlendskar bókmentir og peika á teirra persónligu favorittar til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins.

Tikkanen væntar, at finska Leenea Krohn hevur besta møguleika at vinna virðislønina, meðan Gunnar Hoydal heldur, at kappingin serliga kemur at standa ímillum danska Jens Smærup, norska Carl Frode Tiller og Carl Jóhan Jensen, ið er føroyska uppskotið í ár.

## Í skaldafótasporum

Norsk lokalbløð hava víst vitjanini úr Føroyum og Finlandi rættiliga stóran ans um vikuskifti og fyriskiparnir gjørdu eisini ferðina serliga áhugaverda fyri høvundarnar. Millum annað vóru Gunnar Hoydal og Märta Tikkanen á vitjan hjá Hans Antonsen, framsøgumanni í Grimstad – Dikternes By, har ungi Henrik Ibsen skrivaði sínar fyrstu tekstir og har Knut Hamsun livdi og skrivaði ein stóran part av sínum langa og virkna lívi sum rithøvundur.

Tiltakið varð stuðlað av Nordisk Kulturfond, Norðurlandahúsinum í Føroyum og Nordisk Informationskontor í Suður Norra.

## Bókabýur

**Bókabýurin í Tvedestrand er ein býarpartur, har bøkur í allar mátar seta dám á býarmyndina. Í Tvederstrand eru 15 bókahandlar og antikvariat við á leið 400.000 bókum, umframt at skipað verður fyri eini 40 bókatiltøkum um árið.**

**Millum annað er tað siðvenja í Bókabýnum at varpa ljós á norðurlendskar bókmentir í sambandi við, at vinnarin av Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins verður funnin síðst í februar.**




RØRSMIÐUR

**Vit sóknast eftir einum rørsmiði at byrja skjótast gjørligt**

**Tín førleiki**
Vit vóna, at tú ert dugnaligur, íðin, nærlagdur og sjálvstøðugur. Harafturat skalt tú skilja týdningin av góðum handverki.

**Afturfyri bjóða vit**
Tú fært góðar arbeiðsumstøður og eitt mennandi fakligt arbeiðsumhvørvið.
Stutt sagt – eitt starv í einari spennandi og fjøltáttari fyritøku í støðugari menning.

Um tú hevur spurningar, ert tú vælkomin at ringja til Arthur á tel. 21 96 00 ella 31 20 00.

**Maria Poulsen pf**
Postmoga 182
FO-110 Tórshavn

**Maria Poulsen**





**Nýtt!**
**Elektroniskt kotulás**
Ver tryggur við einum elektroniskum lási frá okkum.





**Lásini fáast eisini til fingraavtrykk!**

**Heilt nýggj og øðrvísi lás!**
**Høg góðska og tryggleiki uttan nýtslu av lyklum. 10 ymiskar kotur, vel tølini (1-10) sjálv/-ur. Passar til vanligar lásakassar. Kann setast í inn- og úthurðar. Tolir veður og vind. Kann latast upp bæði uttanífrá og innanífrá við kotu. Kann eisini fáast við alarmskipan. Vælegnað til barnafamiljur, almennar stovnar og fyritøkur. 2 ára garanti**

Valdemar Lützen Byggibúð
Skálatrøð 14 Tel 30 10 20 · vlb@vlb.fo